gult12 cyan12 magenta12 svart12



Ingeborg Vinther:

# Vit seta hart ímóti hørðum

**– Tað er nógv fyri, men eitt tað største takið hjá okkum undir verkfallinum, verður at verja okkum fyri verkfalsbrótarum úr Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*–Verður tað neyðugt, fara vit at blokera vegirnar fyri at forða fyri, at farmur verður fluttur til verkfalsrakt øki, sigur Ingeborg Vinther.*

–Vit ætla at gera okkara ítarsta fyri at verkfallið verður so effektivt sum gjørligt. Tað segði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í gjáramorgunin.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag lýsti verkfall mikunáttina og í gjáramorgunin arbeiddu tey av kraft fyri at skipa verkfallið, so at tað bleiv so effektivt sum gjørligt.

Av tí, at Havnar Arbeiðskvinnufelag og arbeiðarafeløgini í Klaksvík hava skrivað undir sáttmála, kann tað blíva trupult at gera verkfallið effektivt.

Men Ingeborg Vinther leggur dent á, at tey ætla at seta hart ímóti hørðum.

Og hon sigur, at tað tykist sum um, at tey fáa brúk fyri tí frá fyrsta bríksli.

– Tað frættist longu um, at bilar eru á veg úr Havnini inn í Eysturoynna við farmi.

Ingeborg Vinther sigur, at tann flutningurin skal steðgast, tí Eysturoy er varkfalsrakt arbeiði og tískil er tað verkfalsbrot at flyta farm í Eysturoynna.

– Um neyðugt fara vit at seta tiltøk í verk og at blokera vegirnar fyri at steðga farmaflutninginum út á bygd, sigur Ingeborg Vinther.

– Sostatt sær út til, at ein av okkara mest krevjandi uppgávum verður at verja okkum fyri verkfalsbrótarum úr Havnar Arbeiðsmannafelag og tað er nógv fyri, heldur Ingeborg Vinther.

### Skal ikki misbrúkast

Áður, tá ið verkfall hava verið, hevur tað eisini rakt Strandferðsluna og ikki minst siglingina hjá Smyrli, tí teir, sum binda skipið í Suðuroy, eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Men hesuferð siglur Smyril sum vant.

– Vit vilja vera lagalig og vit duga ikki at síggja endamálið í at forða fyri vanligum ferðafólkaflutningi, sigur Ingeborg Vinther.

Men hon leggur dent á, at farmur skal ikki flytast við Strandferðsluni, hvørki við Smyrli til Suðuroyar, ella við øðrum bátum til útoyggjarnar.

– Vit hava eina avtalu við Strandferðsluna um, at farmur skal ikki takast við bátunum til tey økini, sum eru rakt av verkfalli. Og hendan avtalan skal haldast.

Hon sigur, at tey fara at seta fólk at ansa eftir, at hendan avtalan ikki verður misbrúkt.

– Vísir tað seg, at fólk misbrúka avtaluna, so at t.d. hvør persónbilur er fullur av farmi, verður eisini Smyrli lagdur, sigur Ingeborg Vinther.

Karl Johansen:

# Vit gera sum vit plagdu

**Havnar Arbeiðsmannafelag er ikki sinnað at átaka sær leiklutin sum verkfalsvakt fyri Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*– Vit fara ikki at spyrja eftir, um farmurin, sum verður lossaður í Havn, skal út á bygd, ella ikki, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag*

–Allur farmur, sum kemur til Havnar, verður lossaður. Vit fara ikki at spyrja eftir, um farmurin skal út á bygd, ella ikki.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, ger púra greitt, at hann fer ikki at átaka sær leiklutin sum verkfalsvakt fyri Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, nú tey hava lýst verkfall.

Tá ið Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag lýsti verkfall beint eftir midnátt síðstu nátt, legði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag áherðslu á, at tey fóru at gera sítt til, at verkfallið bleiv so effektivt sum gjørligt.

Eitt nú fóru tey at bera so í bandi, at farmur, sum skuldi á bygd, varð blokeraður.

Hetta kann annars gerast ein trupulleiki, nú Havnar Arbeiðsmannafelag hevur gjørt sáttmála, og tí arbeiðir sum vant.

Støðan kann tí gerast tann, at allur farmurin verður bara lossaður í Havn og so koyrdur út á bygd.

Og Karl Johansen ger púra greitt, at hetta er ikki ein spurningur, sum Havnar Arbeiðsmannafelag kann leggja seg út í.

– Vit fara ikki at sortera farm, sum kemur til Havnar. Tann farmur, sum kemur til Havnar, verður sostatt lossaður, sigur Karl Johansen.

Hann sigur, at koma bilar eftir farminum, fer Havnar Arbeiðsmannafelag ikki at spyrja, hvagar farmurin skal, áðrenn bilarnir verða lastaðir.

Ingeborg Vinther segði við Útvarpið í gjáramorgunin, at allur farmur, sum skal út á bygd, er verkfalsrakt arbeiði, sama, hvar hann verður lossaður.

– Eg vil fegin síggja teir fakfelagsleiðarar og tey fakfeløg, sum fara at gera seg til verkfalsbrótarar, sigur Ingeborg Vinther.

–Tað fáa vit ikki gjørt so nógv við. Vit hava ongantíð sortera frakt og tað kunnu vit heldur ikki gera hesuferð. Vit gera akkurát, sum vit plagdu, sigur Karl Johansen.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

Bilar

Nr. 89 • hósdagur • 10. mai 2001 • 75. árgangur



# Smart skal tað vera - MCC Smart Cabrio

**Landshandilin í Havn, sum umboðar Fuji video og kasettubond, og fløgur, hevur lánt ein MCC Smart Cabrio frá Fuji Danmark, til at seta inn í stóru handilshúsini til at marknaðarføra teirra vørur.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fuji Danmark hava brúkt hendan Smart bilin til at standa inni í stórum handilshúsum við teirra vørum. Orsøkin til at teir brúka ein Smart, er at bilurin er lítil og lættur at fáa inn í handlarnar og hann vekjur ans, so fólk koma yvir at hyggja eftir bilinum samstundis sum tey síggja Fuji vørurnar. Framleiðslan hjá Fuji í Evropa er í Køln í Týslandi, og Fuji Danmark leverar vørurnar til Landshandilin í Havn. Smart bilurin stendur nú inni í Miklagarði í SMS, fyltur við Fuji vørum. Bilurin kemur at verða har eina tíð, til hann skal inn í nýggja Bónus handilin á Óðinshædd, og møguliga eisini aðrar handlar.

### Micro Compact Car

Smart verkætlanin kom upprunaliga frá designarasentrinum hjá Mercedes-Benz í USA, men tað vísti seg at Nicolas Hayek, stjóri á Swatch urverksmiðjuni í Sveits, hevði næstan sama hugskot. Hetta førdi til samstarv millum Mercedes og Swatch um hendan lítla og orkusparandi býbilin. Tað at bilurin fekk eina ógvuliga trupla byrjan, førdi við sær at Swatch urverksmiðjan tók seg úr samstarvinum, og Daimler-Chrysler yvirtók fyritøkuna, sum nú eitur MCC Gmbh, ið er ein stytting av Micro Compact Car.

### Tvey sitipláss

Bilurin er bert 2.50 m langur, umleið sama longd sum ein lastbilur er breiður. Motorurin liggur omaná bakaksulinum, og bilurin trekkjur við bakhjólunum. Bilurin hevur Tiptronic aut. gearkassa, og 6 gear at skifta manuelt. Smart, sum bert hevur tvey sitipláss, er gjørdur út frá kanningum sum vísa, at tað sum oftast eru tvey fólk í teimum smáu bilunum sum koyra inni í býunum. Serliga konufólkini hava tikið væl í móti Smart, sum er nógv brúktur í stóru býunum í Evropa, har tað vegna plásstrot er sera hent at hava ein bil sum bert er 2,50 m langur, og harvið lættur at parkera.




*MCC Smart er bert 2.50 m langur. Stoff-takið verður latið upp við at trýsta á ein knøtt á gardanboksini*

## MCC Smart Cabrio

| | |
|---|---|
| **Motorurin:** | 3 syl. 0.6 litur 55 hk |
| **0-100 km/t:** | 17,2 sek |
| **Bensinnýtsla:** | 20,8 km/l |
| **Dekkstødd:** | framman: 145/65-15, aftan: 175/55-15 |
| **Stødd og vekt:** | Longd: 250 cm, Breidd: 154 cm, Hædd: 155 cm, Eginvekt: 750 kg, Viðførisrúm: 150 litur |

